P840–2004049-15

2004049 (P840)

AVRIT

# Roknskaparreglur fyri Postverk Føroya

## Vísandi til § 14 í konsessión frá 7. juni 2004 til Postverk Føroya ásetur landsstýrismaðurin fylgjandi roknskaparreglur:

§ 1. Postverk Føroya (PVF) skal roknskaparliga skilja sundur allan sín ársroknskap í innanhýsis roknskapar fyri tænastusløg, sum tilskilað í stk. 2.

Stk. 2. Fylgjandi tænastusløg skulu í minsta lagi skiljast sundur roknskaparliga:

1) Skylda uttan kapping, (adresserað brøv upp til 2 kg, frímerki)
2) Skylda í kapping (adresseraðir pakkar upp til 20 kg, adresseraðir príslistar, bóklingar, bløð og aðrar prentaðar sendingar upp til 2 kg eins til innihalds ikki í bjálva, tíðindabløð, dag-, viku- og mánaðarbløð og tíðarrit upp til 2 kg og peningaflytingar).
3) Frí kapping (alt sum ikki kemur undir pkt. 1 og 2.)

Stk. 3. Rakstrarroknskapur fyri tey í stk. 2 nevndu tænastusløg skal gerast sambært meginreglunum í ársroknskaparlógini, og sundurgreining av avskrivingum og rentum fyri hvørt tænastuslag sær.

Stk. 4. Tá roknskaparlig sundurbýting av tænastusløgum verður gjørd, skulu fylgjandi býtisreglur nýtast:

1) Beinleiðis útreiðslur viðvíkjandi stovnseting (etablering), rakstri, viðlíkahaldi og marknaðarføring av viðkomandi tænastusløgum, verða førdar beinleiðis á tænastuslagið.
2) Felagsútreiðslur, t.v.s. útreiðslur, sum ikki eintýddar kunnu førast til eitt ávíst tænastuslag, verða býttar til tey einstøku tænastusløgini so vítt gjørligt grundað á eina analysu av upprunanum til útreiðslurnar.
3) Er tann í nr. 2 nevnda analysa ikki gjørlig, skulu felagsútreiðslur býtast við støði í óbeinleiðis tilknýti millum hesar og eitt annað útreiðsluslag ella bólk av útreiðslusløgum, har eitt beinleiðis tilknýti millum nevnda útreiðsluslag ella bólk av útreiðslusløgum til ávísar aktivitetir er gjørligt. Eitt slíkt óbeinleiðis tilknýti verður grundað á innanhýsis sambæriligar útreiðslubygnaðir (omkostningsstrukturer).
4) Kann hvørki verða funnið fram til beinleiðis ella óbeinleiðis grundarlag fyri býti av felagsútreiðslunum, verða hesar býttar eftir einum býtislykli, sum er roknaður við støði í lutfallinum millum allar útreiðslurnar, ið beinleiðis ella óbeinleiðis hava sín uppruna í ella verða tillutaðar deils viðkomandi tænastuslag og deils øðrum tænastuslag.
5) Inntøkur, sum fáast til vega við, at PVF rekur virksemi innan ávís tænastusløg, verða býttar eftir teimum í punkt 1-4 nevndu meginreglum fyri býti av útreiðslum.
6) Inntøkur, sum ikki fáast til vega við, at PVF rekur virksemi innan eitt ávíst tænastuslag, kunnu ikki takast við í roknskapin fyri hetta tænastuslagið.

Stk. 5. Upplýsingar um møguligar broytingar í innanhýsis mannagongdum og meginreglum fyri býti av útreiðslum og inntøkum millum tey einstøku sjálvstøðugu tænastusløgini innan karmarnar av ásetingunum í stk. 4, skulu framganga av ársroknskapinum, sum árliga verður sendir Posteftirlitinum eftir § 3.

Stk. 6. Roknskapirnir fyri tey einstøku tænastusløgini skulu setast upp soleiðis, at møguligt er at siggja, um útreiðslurnar fyri tey ymsu tænastusløgini bert umfata útreiðslur, sum kunnu takast við í útrokning av prísum fyri hesi sløgini av virksemi. Verða útreiðslur tiknar við, ið ikki kunnu roknast við í prísáseting fyri viðkomandi tænastuslag, skulu tær framganga serskilt við frágreiðing um, hví tær ikki kunnu takast við í prísásetingina.

Stk. 7. Um inntøkur og/ella útreiðslur verða fluttar millum tænastusløgini (innanhýsis avrokning), skal framganga av økisroknskapinum (t.e. roknskapinum fyri tænastusløgini), hvussu stórur partur av inntøkum og útreiðslum viðvíkur útfakturering, og hvussu mikið viðvíkur egnari nýtslu. Posteftirlitið kann krevja skjalprógv fyri, hvussu slík innanhýsis avrokning er roknað.

§ 2. Til tess at seta í verk tiltøk mótvegis kappingaravmarkingum, verða fylgjandi reglur at galda:

1) Innanhýsis avrokning av tænastum og annars allar flytingar, sum kunnu koma fyri, millum eitt sjálvstøðugt tænastuslag og restina av fyritøkuni skulu fara fram til marknaðarprísir. Er eingin marknaðarprísur, skal útrokning gerast av teimum útreiðslum, íroknað marknaðarliga renting, ið stava frá framleiðslu av viðkomandi tænastu.
2) Har felags framleiðslutól (produktionsfaciliteter) verða nýtt, skal prísásetast til marknaðarprís.

§ 3. PVF skal innsenda rakstrarroknskap fyri hvørt sjálvstøðugt tænastuslag (økisroknskap) umframt ársroknskapar við møguligum konsernroknskapi og ársfrágreiðing fyri alla fyritøkuna til Posteftirlitið í seinasta lagi 4 mánaðir eftir, at roknskaparárið er endað. Roknskapirnir skulu verða grannskoðaðir av løggildum ella skrásettum grannskoðara. Saman við roknskapunum skal fylgja við ein váttan frá grannskoðara um, at reglurnar í hesum fylgiskjali eru hildnar.

Stk. 2. Við ársroknskapinum skal vera ein avstemman av økisroknskapinum, so rakstrarroknskapurin í ársroknskapinum lætt kann setast saman av økisroknskapunum. Somuleiðis skal saman við ársroknskapinum vera eitt yvirlit í skemaformi (matrisa) yvir allar innanhýsis avrokningar millum virkisøki. Avstemman av økisroknskapum og yvirlit yvir innanhýsis avrokningar skulu vera umfataðar av teirri í stk. 1 nevndu grannskoðaraváttan.

**Vinnumálaráðið tann 6. apríl 2005**

Bjarni Djurholm
*landsstýrismaður*

/Arne Poulsen